Bókaummæli

Jógvan Isaksen:
Føroyski Mentunarpallurin.
Greinir og ummæli. Mentunargrunnur
Studentafelagsins. 1983. 366 bls.

Føroyski Mentunarpallurin er býttur sundur í fýra partar, og tað er yvirskriftin á tí fyrsta partinum, sum hevur givið bókini navn. Her skrivar Jógvan Isaksen m.a. um »tannleysgeringina av føroyskum bókmentum«. Høvundurin ger fleiri ferðir ta niðurstøðu, at vit í Føroyum ikki hava nakra »traditión fyri bókmentaummælum og bókmentateoretiskum tjaki«.

Bók hansara verður tískil at skilja sum ein roynd at gera hol í sjógvin á hesum øki, og vit ásanna, at eingin kann vera betur fyri at gera hetta slóðbrótandi arbeiðið enn hann, ið er magistari í bókmentum.

Hvussu hevur so henda roynd eydnast?

Misjavnt, verður meting mín, tí so ójavnir í dygd eru teir ymsu partarnir í bókini, at tað er undrunarvert.

Lakasti parturin eru tey tjúgu ummælini, sum onkursvegna als ikki standa mát við hinar partarnar av heildini. Í inngangínum vísir høvundurin eisini, at hann hevur varhugan av hesum veruleika, tí sum hann tekur til:

> *»Eg skal ikki dylja yvir, at einstøk av ummælunum høvdu verið skrivað øðrvísi, um eg skuldi havt skrivað tey í dag«.*

Skal nakað endamál vera við bókaummælum, má ummælið hava tveir eginleikar:

Tað skal siga teimum, ið ikki hava lisið bókina, okkurt grundleggjandi um verkið, og tað skal leiðbeina høvundin, so hann sjálvur kann taka støðu til tey ráð og tær vegleiðingar, ið ein, sum býður seg fram sum ummælari, gevur.

Ummæli Jógvan Isaksens hava ikki hesar eginleikar, tey eru minni enn so altíð upplýsandi og í flestum førum í ov stóran mun svørt/hvít: Høvundurin verður annaðhvørt hevjaður til skýggja - bókin er gáva frá himli, klassikari (hóast nýliga útgivin) o.s.fr. - ella rindaður til jarðar: søgurnar eru valla skaldskapur yvirhøvur. Í hvørgum føri finna vit nakra dýpd, tá ið støðutakan ummælarans skal grundgevast. Sum eitt dømi av mongum kunnu vit taka fram ummælið »Uppbyggjandi søgur fyri ungdómin«, sum viðger søgusavn Ólavs í Beiti »Ung sál«. Ummælið byrjar við at greiða frá, at hóast talan her er um eitt av teimum fáu stuttsøgusøvnunum, komin eru í Føroyum seinastu árini, so hava ummælini av bókini verið fá.

»Orsøkin til tey tørvandi ummælini«, sigur Jógvan Isaksen, »er helst hon, at trúnað-

arligar søgur sum hesar ikki verða mettar at vera veruligar bókmentir«.

Hann leggur so aftrat:

»her kann so tjakast um, hvat veruligar bókmentir eru«.

Lesarin situr nú spentur og bíðar eftir hesum »tjaki«, men hóast hann lesur gjøllliga líka út til niðurstøðu ummælarans:

»Søgurnar eru avgjørt ikki stórur skaldskapur og kanska valla skaldskapur«,

so verður einki av hesum »tjaki«.

Álvartos! Hetta er at fara so lættliga um eitt álvarsevni, at tær renna í hug orð danska balettstjórans, Auguste Bournonville, tá ið hann segði:

»Gerst ongantíð ummælari, tí tað forherðir hjartað og fær teg at meta við kulda tað, ið skapað var við eymleika«.

Aðrir veikleikar við ummælunum eru t.d. at í summum teirra – eitt nú »Í Grønlandi við Kongshavn« og í ummælunum av yrkingasøvnunum – fylla sitat úr bókunum órímiliga nógv av heildarviðgerðini og í einstøkum – eitt nú »Ein tíðarmynd« og »Tilvildin ræður« – verður so órímiliga nógv gjørt burtur úr tulking av kápumyndini, at tær ikki nýtist at vera ein »forherðingur«, um tú kemur til ta niðurstøðu, at henda viðgerð hevur til endamáls at birta fyri lesarunum, hvussu frálíkt innlit ummælarin sjálvur hevur í forngrikska søguheimin og í søguna um myndagripirnar í Sixtinska kapellinum. – Hvat ið hesar tulkingarroyndir hava við viðgerðirnar av áðurnevndu bókum at gera tykist ein gáta.

Partarnir II og III eru stórir, ávikavist 178 og 44 síður. Við innliti og góðari fatan yvirhøvur viðger Jógvan Isaksen her heildarverk ella týðandi partar av skaldskapinum hjá Jens Paula Heinesen, Karsteni Hoydal, Heðini Brú, Rikardi Long og J.H.O. Djurhuus.

Nærlagdur tulkar hann eina yrkingina fyri og aðra eftir, og um tú so ert samdur ella ósamdur við tulkingarroyndir hansara, so verður tú at viðurkenna, at her er brotið upp úr nýggjum í føroyskari bókmentagransking.

Men sjálvt í bestu greinum sínum er Jógvan Isaksen ov lítið vandin í skriving síni; hesi dømi, tikin úr tjúgu teimum fyrstu síðunum av viðgerðini av skaldskapi Janusar, munnu vera fullgóð ábending: Á síðu 23 byrjar J.I. inngang sín um skaldskap Janusar soleiðis:

»Grundarlagið undir hesi viðgerð av skaldskapinum hjá J.H.O. Djurhuus eru tær yrkingar, sum eru prentaðar í yrkingasøvnunum«

Sum inngangsljóð hevur hann so valt sær eitt ørindi eftir amerikumannin Poe og ørindið hjá Janusi, sum byrjar: »Men gev mær hvassan landnyrðing...« – sum ongantíð fekk innivist í nøkrum yrkingasavni hjá Janusi!

Á síðu 25 finna vit hesa óhepnu orðing:

»Tá Janus í realskúlanum sýndi serliga góð evnir, fekk presturin Emil Bruun eyga á hann og fór undir at geva honum serundirvísing, einahelst í grikskum og latíni«.

Hvørt skúlabarn í Føroyum veit, at serundirvísing fær hann ella hon, ið *ikki* sýnir

serliga góð evnir. Janus fekk frálæru framíhjá, júst tí hann í skúlanum sýndi góðar málsligar gávur.

Á síðu 27 nevnir J.I., at fyrsta yrkingasavn Janusar, sum kom út í 1914, samstundis var

»fyrsta veruliga yrkingasavnið á føroyskum«.

Hann heldur tó í hesum sambandi áneyðir vera at nevna, at í 1892 kom út savn av yrkingum, sum ymiskir høvundar høvdu yrkt: »Føriskar vysur – irktar o sungnar äv føringum y Kjøpinhavn«, 1892.

Hetta er alt rætt, men skuldi viðmerkingin verið fullfíggjað, átti at verið nevnt, at søvn sum »Smásangir og Sálmar«, 1899, »Sangir og rímur úr »Tingakrossur««, 1904, »Songbók Føroya Fólks«, 1913 og møguliga onnur við vóru komin út undan Janusar fyrsta savni.

Eitt annað dømi á somu síðu:

»Fagnaðurin um hetta nýggja skald (Janus – á.d.) var stórur frá øllum síðum, t.v.s. frá øllum teim meira og minni intellektuellu«.

Í hesum setningi er ikki lítil andsøgn, og harafturat er at nevna, at eingin tilvísing er at stuðla hesa niðurstøðu; hon hongur púra í leysari luft.

Og so enda vit við hesum setningi:

»»Dreymur« er eisini ein yrking við dreymi sum evni«.(s.41)

Ikki kan sigast annað enn, at hetta er jarðbundin útsøgn – og hon er einki eindømi í skriving Jógvans Isaksens.

Tað er fyrsta høvuðsdeild, ið givið hevur bókini navn. »Føroyski mentunarpallurin« er, sum tikið verður til, »Nakrar hugleiðingar um bókmentir og samfelag í samband við fyrilestur um skaldskapin hjá Heðini Brú« og fyllir síðurnar frá 11 til 19.

Viðgerðin av bókmentum og samfelagi og av hvønn leiklut bókmentir hava yvirhøvur er bæði sannførandi og væl úr hondum greidd, men viðmerkingar høvundsins til føroysk bókmentaviðurskifti eru ófullfíggjaðar, skrivaðar í gáloysni og mangan beinleiðis skeivar.

Her verða gjørdar viðmerkingar bert til ta einu síðuna – síðu 11:

»Meðan tú mangastaðni hevur eina rættiliga gamla traditión fyri bókmentaummælum og bókmentateoretiskum tjaki, so finst einki samsvarandi í Føroyum. Ein av orsøkunum til hendan tørv ella hesa ómegd er, at málið er so ungt«.

Føroyskt mál hevur – tað vilja málgranskarar vera við – longu um 1500-1600 fingið tað snið, tað hevur enn í dag. Føroyskt spratt úr norrønum, og tað málið hevði mong hundrað ár á baki.

Ætlaði høvundurin at siga, at málið er ungt sum skrivað bókmentamál, ella at føroyskt skriftmál er ungt, íðan so var bara at skriva tað.

»Fyrsta føroyska skaldsøgan er »Bábelstornið« eftir Regin í Líð í 1909, tann næsta er »Beinta« eftir Hans Andrias Djurhuus frá 1927 og tann triðja er »Longbrá« hjá Heðini Brú, sum kemur í 1930«.

Her »gloymir« Jógvan Isaksen eina bók,

sum av mongum verður mett sum fyrsta átrúnaðarliga skaldsøgan á føroyskum: Victor Danielsen: »Aðru ferð« 1. útgáva 1927, 2. útgáva 1946, 3. útgáva 1962 (3. útgávan varð prentað í 10.000 eintøkum, so lítið man vera at ivast í, at hetta er tann føroyska skaldsøgan, ið komin er í størsta upplagi).

»Sum vit síggja, eru føroyskar bókmentir eitt ógvuliga ungt fyribrigdi – um vit ikki rokna kvæðini við – ...«.

Tá ið kvæðini verða nevnd, hví verða so hini skaldskaparsløgini, ið hoyra undir skaldskap av manna munni, ikki eisini nevnd? Tættirnir, sagnirnar, ævintýrini, skjaldrini?

Og so ger Jógvan Isaksen ta avgjørdu niðurstøðu, at ein bókmentateoretisk traditión »manglar« í Føroyum, sum hann tekur til, og føroysk bókaummæli upp til dagin í dag lýsir hann soleiðis:

»Tað, sum vónandi skuldi verða ein gevandi kritikkur, verður til markleyst rós ella tvætl av slagnum: vøkur bók, liggur væl í hondini o.líkn.«.

Hetta er ein ov avgjørd útsøgn. Fyrst kunnu vit nevna, at Jógvan Isaksen í hesi somu bók rósar bæði Rikardi Long (s.118 og 141) og Karsteni Hoydal (s.199) fyri stuðlandi og eggjandi leiklut teirra í føroyskum mentunarhøpi – hann mótsigur soleiðis sær sjálvum –, harnæst kunnu vit vísa á tann veruleika, at bara í tí eina tíðarritinum »Varðanum«, finna vit fyri tíðarskeiðið 1921-72 um seksti bókmentagreinir og -ummæli – bara vit draga fram fýra nøvn av teim mongu, ið royndu seg: Rikard Long, Christian Matras, William Heinesen og Karsten Hoydal. Og umframt hetta kunnu vit nevna savnið hjá Christiani Matras: »Nøkur mentafólk«, 1973, bókmentagreinirnar, Maria Mikkelsen skrivaði í fjørutiárunum og ummælaraavrik Karsten Hoydals í »14. September« í fjøruti- og fimtiárunum.

Og um so var, at ummælarar í Føroyum kanska vóru í so fagurlátnir, mundi tað ikki hava sínar orsakir? Mundi tað ikki vera tí, at ummælararnir vistu, at tað, ið kom á prenti, var ein liður í málstrevi hjá fámentari tjóð, at yrkingar og søgur mangan vóru skrivaðar av málsligum eldhuga heldur enn av stórum skaldagávum?

Og skoðar tú bókina »Føroyski mentunarpallurin« úr málsligum sjónarhorni, so skilir tú væl, at niðurstøður, sum júst oman fyri nevnda, gleppa Jógvani Isaksen av hondum.

Málsliga er bókin fátækslig, og í eini tíð, har føroyskir skúlaungdómar sum ongantíð áður greina tekstir eftir »analysumodellum«, sum teir rópa greiningarfrymlarnar, har hesi ungu tosa um »fablar, tema og motiv, metaforar, indre monolog og kompositión«, er harmiligt at ásanna, at einasti útbúni bókmentametari okkara ikki bjóðar til at skapa hesi vísindagrein frøðiorð á móðurmálinum.

Árni Dahl.

BÓKAUMMÆLI

Arnfinnur Thomassen:
Færøsk i den færøske skole fra århundredskiftet til 1938.
Odense 1985. 139 bls.

Henda ritgerð gevur skúladømi um, *hvussu* fløkt tað kann vera at skapa javnvág millum frálæruna í fyrsta og øðrum máli í tvímæltum skúla (her at skilja sum skúla, ið miðar ímóti at veita næmingum hægri førleika enn vanligan fremmandamálsligan í málinum, sum ikki er móðurmálið).

Uppalingarligi spurningurin, ið var at greiða í Føroya skúla tá í tíðini, var ikki ógreiðandi eftir tíðarinnar fortreytum, nevniliga øðrumegin at lúka tey rættvísu krøv, at undirvísingin í móðurmálinum, føroyskum, varð røkt til lítar, og hinumegin at tryggja, at undirvísingin í donskum var á hóskandi frøðiligum stigi. Langt frammanundan var soleiðis aðrastaðni í danska ríkinum framd ein munandi djarvari roynd við býtinum millum málini í tvímæltum skúla: (sí ritgerð mína: Dansk og tysk som undervisningssprog i Flensborg mellem de to slesvigske krige – et forsøg med tosproget undervisning. Í: Uddannelseshistorie 1984). Men hví miseydnaðist tað ígjøgnum so mong ár í føroysk-donskum samheingi. Ritgerð Arnfins Thomassens skjalprógvar, hvat ið henda kann við einum í sjálvum sær lítlum vandamáli í tvímælisuppalingarfrøði, tá ið hugmyndafrøði og politikkur so *dyggiliga* kollrenna tað uppalingarfrøðiliga. Her er sum vera man hugsað um roynd sambandsmanna at tvíhalda um danskt sum »mentamál« Føroya og »stríðsfúsu« krøv sjálvstýrismanna um, at skúlin skuldi gerast »føroyskur«, og tað gjørdist eyðvitað ikki, uttan at yvirræði danska málsins varð skert. Sum høvundurin skrivar, vóru flestir føroyingar um aldamótið samdir um høvuðsspurningin, at føroyskt *skuldi* fáa innivist í Føroya skúla, tó at ósemja var um, á hvønn hátt og hvussu skjótt henda broyting skuldi henda. Tað sigur nakað um djúptøknar munir í Føroyum tá á døgum, at henda semja um aðalspurningin ikki kundi halda, soleiðis at *føroyingar, ið talaðu føroyskt,* ikki kundu vera samdir um ta støðu, ið *føroyskt* skuldi hava í *føroyska* skúlanum. Sum kunnugt vaks ósemjan til eitt rættiligt málstríð við eyðhoyrdum politiskum yvirtónum: Støða sambandsfloksins gjørdist ímynd av gamla málsliga og mentanarliga bandinum til Danmarkar – og harvið í síðstu atløgu av ríkisfelagsskapinum – og sjálvstýrisfloksins av loysingini av gomlu ófrælsisviðurskiftunum við Danmørk. So greflig einfaldan kann ikki vera heppin fyri uppalingarligan spurning. (Í hesum fruktaleysa skotgravastríði liggur eisini ein ávaring til framtíðar málráðleggingararbeiði í Føroyum, ein ávaring um *ikki heilt* at lata tað politiska skugga á tað uppalingarliga.)

Tað skilst greidliga av hesi ritgerð, at føroyingar *í fyrsta umfari* kunnu takka sjálvum sær fyri, at hetta málstríð gjørdist so drúgt og beiskt. Høvdu partarnir báðir kunnað

nærkast við at leggja fram einahvørja neyðsemju, mundi skúlamálaráðharrin longu tíðliga kunnað greitt fløkjuna. Henda ásannan er kortini eingin roynd at tváa danir reinar; teir dugdu við hegni at »spæla upp á« ósemju føroyinga, yvirhøvur við »natúrligum sertokka« til sjónarmiðini hjá sambandsmonnum.

Høvundurin skrivar í niðurløgu síni, at tað helst mundi verið óráðtøkið at skuldsett skiftandi danskar stjórnir fyri við illvilja at hava forðað føroyskum málstarvi. Hann heldur at fákunna vegna vantandi upplýsing hevur verið meginorsøkin. Eftir framlagda tilfarinum tykir hetta trúligt, men eisini eigur at verða tikið fram, at ikki allir danir, ið vóru nærri tilburðunum, sýndu nakran góðan vilja. Hetta er eisini ein rannsókn í mál- og mentanarimperialismu, tí hóast fákunnu um føroyskar umstøður raðaði stríðið seg, tá ið saman um kom, um ein undirstøðuspurning, og tað er *rætt menniskjans til at fáa læru í og á móðurmáli sínum*. Tó at lagt verður upp fyri søguligar og landafrøðiligar munir, var hetta kortini eitt evni, sum fólk í Danmørk var kunnugt við í slesvíkskum samheingi. Eins og kunnugt er, hevði Svend Grundtvig longu í 1845 víst á tað samsvarið, so har kundu danir ið hvussu er ikki umbera seg við fákunnu!

Tó at havt verður í huga hitt tíðareyðkenda miðleysa kjakið um, hvørt føroyskt kundi eita »rættiligt« mál ella átti at nevnast »dialekt«, og annað tílíkt, ið gruggaði orðaskiftið, er og verður tað kortini hugstoytt at noyðast at ganga undir, at fólk í heimlandi Grundtvigs »havde så lidt forståelse for modersmålets fundamentale betydning for et lille folks udvikling og kulturelle overlevelse« (bls. 2). Men hóast hetta orðalag sýnir bókin, at yvirhøvur var tað hjá grundtvigskum fólki, at føroysku málevnini kundu vænta at finna djúpasta fatan. Ber tilvild er tað tí neyvan, at tað var grundtvigsmaður (Jørgen Jørgensen), ið sum skúlamálaráðharri nógv seinni loysti hesa uppalingarligu fløkju við í 1938 í royndunum at javnseta føroyskt og danskt í føroyska skúlanum.

Tað er hetta drúgva, seiga og kensluborna málstríð, ið lýst verður í bók Arnfins. Bókin er serritgerð til próvtøku á lærdum háskúla, og er her tískil um »studentagransking« at røða. (Hetta orð er ikki her nýtt í niðrandi merking, men til at gera vart við eina natúrliga avmarkan í samanburði við meira »yrkisliga« gransking.)

Høvundurin hevur eftir mínum tykki gjørt gagnligt verk við at hava savnað og kervað eitt stórt prentað og óprentað heimildatilfar. Her og har hevði verið eftirynskjandi at fingið eina dyggari greining av hesum stórfingna tilfarssavni í staðin fyri at noyðast at hjálpast við nakrar hissini viðmerkingar. Eisini er saknur í betur búnum evnum til at taka saman um aðaltættir í teimum einstøku kapitlunum, soleiðis at lesarin villist ikki í nøgdini av staklutum, men mestan týdningin hevur tað eyðvitað, at verkið er dygt og álítandi, og eg kenni meg fullvísan í, at so er. Eg skilji, at høvuðsætlanin við ritgerðini hevur verið at kortleggja týðandi tortøki í føroyskari skúlasøgu. Henni á baki eiga framhaldandi kanningar at koma.

Bent Søndergaard